**Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð**
**Bygdarráðsfundur tann 28. januar 2020 kl. 19$^{00}$**

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, John Zachariassen, Símin Jákup Højsted, Eyðun Hansen, Durita á Heygum, Laila Haldansen og Herit Magnussen

**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri boðaði Ingi Olsen tann 21. januar 2020 frá, at honum barst frá at møta á fundinum.
Hilbert Elisson, 1. tiltakslimir á lista A er fluttur úr kommununi og tí fekk Símin Jákup Højsted fundarboð. Hann játtaði at møta.

Eyðun Hansen farin av fundi vegna ógegni.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 185**
Tilmæli frá Havnarnevndini um áheitan frá Inga Durhuus o.ø. um møguleikan fyri at kunna koyra við bili til tey nýggju neystini (nummar 1-6).
J.nr. 201032-4-2019

Havnarnevndin viðgjørdi á fundi 20. janaur 2020 áheitan frá Inga Durhuus o.ø. um møguleikan fyri at kunna koyra við bili til tey nýggju neystini (nummar 1-6).

Nevndin mælir til at geva teimum loyvi til at gera tað møguligt at kunna koyra við bili til neystini, men at teir sjálvir bera kostnaðin av hesum. Arbeiðið skal tó gerast eftir ávísing frá teknisku deild hjá kommununi, og skal undir ongum umstøðum skerja um verandi veg og eina møguliga gongubreyt í niðara borði á hesum.

**Viðv. 185**
Tilmælið var einmælt samtykt.

Eyðun Hansen komin aftur á fund.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.45

Sign.:

Pauli T. Petersen Símin Jákup Højsted Eyðun Hansen

John Zachariassen Laila Haldansen Herit Magnussen Durita á Heygum